# Frímerki til alt árið

Í hesum døgum kemur Frímerkjadeildin út við trimum útgávum – jólamerkjunum, árbókini og ársmappuni.

Við at geva út frímerki síðani 1975 hevur Frímerkjadeildin gjørt sítt til at kunna um føroyska søgu, mentan, náttúru og samfelag.

Hetta hevur eisini verið gjørt í hesum árinum. Íalt eru 617 frímerki givin út hesi 32 árini.

## Jólamerki

Aftur í ár gevur Frímerkjadeildin fólki møguleika at prýða jólapostin við teimum serstøku jólamerkjunum.

Í ár hevur listakvinnan Astrid Andreasen teknað myndirnar, ið eru av børnum sum spæla í kava.

Eins og áður fer yvirskotið av hesi søluni til Jólamerkjagrunnin, sum hevur til endamáls at stuðla tiltøkum fyri børn og ung í Føroyum.

## Árbókin og ársmappa

Samstundis við jólamerkini hevur Frímerkjadeildin givið út árbókina, sum aftur hesa-ferð er prýdd við nógvum og vøkrum myndum.

Í bókini eru øll frímerkini frá árinum og smáørk eru sett í serstakar lummar.

Bókin fæst í tveimum útgávum – einari dansk/føroyskari og einari ensk/týskari.

Ársmappan við øllum frímerkjunum í ár er eisini komin út í hesum mánaðinum.

## Aðrar útgávur

Hóast ein skuldi trúð at hetta var nóg mikið, hevur Postverkið haraftrat givið út tvey postkort ið avmynd standmyndirnar av Mariu og Kristusi.

Á sætta og seinasta sinni eru pappírsklippini hjá Astrid Andreasen gjørd til jólaprýði. Hesar eru fimm í tali og fáast fyri 105 kr.

Til teirra, sum dáma væl at senda jólakort, hevur Postverkið givið út fýra jólakort við somu myndevnum sum á jólamerkjunum.

Umframt alt hetta hevur Postverkið givið út serstøk klistrimerki við somu myndevnum. Hesi merkini eru vælegnað at seta á vindeygu, spegl og onnur støð.

**sb.**





MARKNAÐARRÁK

VIKA 46 2007

**PARTABRØV LÆKKAÐU**

Partabrøv lækkaðu 2%-4% í farnu viku. Marknaðurin er sostatt enn í eini konsolidering. Tá marknaðurin er hækkaður í langa tíð, er vanligt at hann steðgar á eina tíð, áðrenn hann antin heldur fram upp ella vendur. Partabrøv eru hækkað at kalla út í eitt í 4 ár, og nú er fyrstu ferð hetta tíðarskeið, at marknaðurin steðgar á eina løtu og sveiggjar 10%-15% upp og niður uttan rættiliga at koma úr stað. Sum sæst á myndini eru vit nú tætt við niðara enda á hesum intervallinum millum 1320 og 1520, ið marknaðurin sveiggjar. Um ikki okkurt serligt hendir, tíðindi ella annað, er væntandi at norrøn partabrøv fara at venda skjótt og hækka aftur móti 1520. Tað eru enn spekulatiónir um tap orsakað av sub-prime lángeving, sum merkja marknaðin. Í farnu viku kunngjørdi Citibank, sum er heimsins størsti banki, størri tap enn væntað, og hetta setti dám á vikuna. 5 størstu fíggjarfyritøkurnar í USA avskrivaðu 45 mia. dollarar 3. ársfjórðing. Hóast hetta verður 2007 næstbesta ár nakrantíð hjá hesum fyritøkum.

**DOLLARIN AFTUR METLÁGUR**

Dollarin lækkaði eisini í farnu viku. Fríggjadagin var hann niðri á 5,05 kr. Hetta er tað lægsta nakrantíð. Tað er ilt at siga, um tað er minkandi rentumunurin millum USA og Evropa, ið ger munin, ella til dømis veksandi hallið á amerikanska gjaldsjavnanum. Sama ger, íleggjarar halda á at selja dollara. Nú vit eru á heilt nýggjum lágum stigum fyri dollaran, kann hann flyta seg báðar vegir sera skjótt.

**RENTUR LÆKKAÐU**

Lánsbrævarenturnar lækkaðu saman við partabrøvum í farnu viku. Harvið fingu lánsbrævaíleggjarar ein kursvinning aftrat regluligu rentuinntøkuni. 10-ára rentan er nú 4,23%, og hon er hóast alt ikki rættiliga farin at lækka enn.

**HESA VIKUNA**

Fokus er enn á sub-prime og møgulig tap orsakað av henni, umframt roknskapir á okkara leiðum.

**Vísital fyri norrøn partabrøv**




**Donsk 10-ára renta**




| Marknaðir | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| Norðurlond | 1406,36 | -1,63% |
| Alheims partabrøv | 8121,04 | -3,97% |
| Atlantic Petroleum | 2330,00 | + 20,1% |
| Føroya Banki | 211,00 | -4,74% |
| Eik Banki | 640,00 | -2,44% |
| KB Trygg Eurostoxx | 110,49 | + 1,39% |
| USD | 507,82 | -1,18% |
| JPY | 4,59 | + 2,53% |

Broytingarnar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan. Myndirnar vísa gongdina seinastu 3 mánaðarnar.
Greiningin er grundað á keldur, sum Kaupthing metir vera álítandi, men Kaupthing hevur ikki ábyrgd av, at tilfarið altíð er neyvt og nágreiniligt. Kaupthing kann heldur ikki ábyrgdast tapi ella líknandi, sum stendst av gerðum, ið hava støði í greiningunum í hesum tilfari.

Postsmoga 3090, Bókbindaragøta 8, 110 Tórshavn, Tel 351500, Faks 351501, kf@kaupthing.fo, www.kaupthing.fo

KAUPTHING BANK